# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

3. apríl fingu Maibritt Dahl-Olsen, Saksun, og Bjørn Jørgensen, Astrup, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3160 gr.

19. apríl fingu Joan og Bárður Jakobsen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2450 gr.

22. apríl fingu Elsebeth Iversen, Hoyvík, og Heðin Ferjá Heldarskarð, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 33 cm long og vigaði 1100 gr.

23. apríl fingu Joan og Jan Skoralíð, Leirvík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3025 gr.

23. apríl fingu Jenny og Høgni á Lakjuni, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3500 gr.

24. apríl fingu Anja Djurhuus Vilhelm og Hanus Vilhelm, Ålborg, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4150 gr.

25. apríl fingu Marianne Harboe og Sakaris J. Heinesen, Odense, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3830 gr.

25. apríl fingu Maj H. Berg og Bárður Magnusson, Miðvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3950 gr.

25. apríl fingu Malan Mikkelsen og Edvard Sørensen, Viðareiði, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3300 gr.

25. apríl fingu Dora og Petur Olivur Splidt, Saltangará, ein son. Hann var 53,5 cm langur og vigaði 3800 gr.

27. apríl fingu Beinta Gaard og Tróndur Joensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3150 gr.

27. apríl fingu Heidi Hansen og Kartin Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4330 gr.

28. apríl fingu Irdi Thomassen og Valbjørn Ole-Jacobsen, Sandavági, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3525 gr.

29. apríl fingu Anvør og Henrik Joensen, Saksun, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

29. apríl fingu Eyð Jansdóttir Højggg og Eliesar Fróði Høj, Strendur, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2565 gr.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Martin Hammer, trúboðari**, ættaður av Tvøroyri, búsitandi á Nesi, andaðist mikudagin, 79 ára gamal.

**Petur Pauli Petersen av Sandi** andaðist mikudagin 29. apríl í Roskilde, 39 ára gamal.

**Dagurin**

**1.mai. Valborgarmessa.** Hildin til minnis um enska kongsdóttur og nunnu, sum seinni gjørdist abbadissa í kleystrinum Hildesheim í Týsklandi. Hon doyði í 779. Germanskt navn, ið merkir vald og vernd. 1. mai er arbeiðaradagurin, sum varð hildin á fyrsta sinni í París í 1889.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Minningarorð um Ruth Berg

**f. 7. mai 1958 d. 24. nov. 2008**



Góða Ruth. Tómligt kennist tað, nú tú ikki ert ímillum okkum meira. Neyvan vardi tað okkum, at lívsleið tín skuldi gerast so stutt.

Í oktober 2008 fekst tú staðfest krabbamein, fór til Danmarkar at søkja tær heilsubót, men har vóru ongi góð útlit.

Nógv og góð minnir frá barnaárunum í Vági høvdu vit báðar saman. Systkinabørn og vinkonur vóru vit, og spældi javnan saman. Hóast tú var eldri enn eg, so tímdi tú væl at spæla við meg. Eg minnist teg sum eina glaða og stilla gentu, har atburðurin var fyrimyndarligur.

Vit báðar gjørdust mammur í senn, og hetta hevði við sær, at vit sóust regluliga, trillaðu vogn og prátaðu saman. Børn okkara sóust eisini regluliga, ta tíðina tú var í Vági, áðrenn tú flutti til Hvalbiar.

Eisini valdi tú at fara á Heilsuskúla Føroya at nema tær útbúgving, og eg veit hvussu glað tú var fyri hesa avgerð. Tú vísti týðiliga, hvussu gløgg tú var, tí væl gekst tær á skúlanum. Hetta var eisini rætta starvið hjá tær Ruth, tí mong eru vit, ið vistu hvussu avhildin tú var.

Tað gleddi okkum almikið, at tú við familju, saman við mammu tíni og systkjunum valdi at koma í brúðleyp hjá dóttir míni í august 2008, hóast mamma tín fylti 85 ár júst hendan dagin. Onki hugsaðu vit um, at hetta skuldi verða seinastu ferð vit vóru í veitslu saman.

Vit hava júst nú havt aðalfund hjá Heilsuhjálparafelag Føroya, har tað kendist tómligt nú tú ikki var við, sum tú plagdi.

Serliga glað eri eg fyri, at eg og maðurin fingu høvi at vitja teg á Ríkissjúkrahúsinum. Hóast tað var svárt at skula siga tær farvæl, tí tú visti hvønn veg tað bar, so eri eg í dag takksom fyri, at eg fekk hendan møguleikan.

At enda vil eg eisini minnast Ellyfastur, sum doyði í februar 2009. Fegin vil eg takka fyri góðar og hugnaligar løtur, ið eg havi havt inni hjá tykkum. Ivaleyst kendist tað tungt at missa dóttrina Ruth á so ungum aldri.

Mínir tankar leita til tykkum, ið eftir sita, Bjarka, Sóleyð, Heidi, Bjarta og eisini til tín Frederik. Vónandi finna tit troyst í hesi sváru tíð.

Vit hesum orðum vil eg lýsa frið yvir minni um Ruth Berg og Elly Joensen.

**Sunnrid**

# Skeið fyri lymføterapeutar




*Lymføterapeutarnir eru f.v.: Torill Jensen, Agnas Mortensen, Eyðbjørg Joensen, Sólrun Patursson og Karin Djurhuus. Uttast til høgru eru skeiðhaldararnir Jens Ettrup og Stine Bahne*

*Mynd Jens Kristian Vang*

Mánadagin og týsdagin í hesi vikuni skipaði Lymfødemfelagið í Føroyum fyri skeiði fyri lymføterapeutar í MBF-húsinum í Havn.

Felagið hevði vitjan úr Danmark, og tey sum hildu skeiðið vóru Jens Ettrup frá fyritøkuni Specialbandager. dk, sum hevur spesialiserað seg í at gera sokkar, ermar o.l. til lymfodemsjúklingar, og Stine Bahne frá fyritøkuni Simonsen & Weel, sum selur Medi-sokkar til sama endamál.

Skeiðhaldararnir undirvístu lymføterapeutunum um hvat fæst av sokkum, ermum og øðrum, sum er nakað, tey ikki kunnu vera fyri uttan fyri at fáa gerandisdagin at fungera. Limafundur var mánakvøldið har Stine Bahne og Jens Ettrup greiddu limunum frá teirra møguleikum fyri at bøta um.

Nevndin í felagnum var sera væl nøgd við undirtøkuna og við umstøðurnar í MBF-húsinum, har alt kundi vera á einum staði: skeiðið, limafundurin og maturin til tey luttakandi.

Lymfødemfelagið í Føroyum hevur umleið 50 limir og formaður í felagnum er Elsa Wolles.

*mg*